## Hetta klárar ein Ipad ikki !

Børn læra og mennast við aftur og aftur at nema, smakka og flyta uppá lutir. Ikki bert í samspæli við onnur børn í barnagarðinum, men eisini í samspæli við aðrar týðandi persónar.

Ein teldil bjóðar eina ørgrinnu av undirhaldsspølum til heilan. Ímeðan kroppurin er fullkomuliga óvirkin, og er tað bert peikifingurin sum flytir seg. Fyri barnið vil skermurin altíð mangla tað menniskjansliga sambandið, umframt kenslurnar og møguleikar at kanna ymiskar avbjóðingar og royndir.

Sambært sálarfrøðinginum Camillu Behsgaard, eru orsøkirnar fyri at teldilin ikki eigur at vera barnagenta hjá børnum ímillum 3 og 5 ár soljóðandi:

**1.** Heimurin blívur tvívíddur og javnur, ístaðin fyri trívíddur.

**2.** Barnið fær ikki nomið við ymiskt tilfar, og uppliva eina ørkymlandi jagstran eftir eini perlu ella einum stykki av dukkuklæðum við eini ávísum liti, ella at fingrarnir ikki vilja tað sum barnið vil.

**3.** Spæli er fastlagt frammanundan, og hugflogi hjá barninum er óneyðugt.

**4.** Tað er ikki brúk fyri at biðja um hjálp, kjakast við foreldur ella systkin tá okkurt skal finnast, fáast í rættlag ella setast saman. Alt liggur klárt á skerminum, og harvið gerst sambandið við umheimin minnið.